

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 01 - 2012

# Sleipibátur rendi á oljutangaskip í Hetlandi

Tveir av heimsins kraftmiklastu sleipibátum, sum hava støð í Sullom Voe I Hetlandi, eru tiknir úr tænastu fyribils, eftir at annar teirra Solan nú um dagarnar stoytti saman við tangabátinum Loch Rannoch, sum flytur olju frá Schiehallion kelduni vestan fyri Hetland til oljuhavnina Sullom Voe. Sum skilst er skaðin ikki stórur, men um illa vildi til, kundi hann verið nógv størri skrivar Shetland Times. Eingin olja var í skipinum, tá hendingin fór fram. Loch Rannoch varð á veg út úr oljuhavnini at fara eftir nýggjari last, tá óhappið hendi. Solan, sum kostaði 60 mill. at byggja kom úr Spania saman við einum systurskipi í februar í fjør. Bæði Solan og systurskipið Bonwie, skuldu eftir ætlan fara á skipasmiðju tíðliga í ár fyri at fáa gjørt ábøtur og broytingar. Tað hava verið mekaniskir trupulleikar við báðum sleipibátunum, síðani teir komu úr Spania. Maskinan steðgaði bráddliga og tí rendi Solan á tangaskipið, men til alla lukku eydnaðist at fáa maskinuna í gongd aftur um sama mundið.